
Norski uttanríkismálaráðharrin, Børge Brende. Mynd: EPA

# Vilja stuðla við pengum fyri at lond brúka minni av kolvetni

**Jógvan Hugo Gardar**

18.04.2015 - 21:40

Oljan.fo

Fleiri lond, harímillum Noreg, blivu í gjár samd um at seta í gongd tiltøk fyri at fáa lond at gevast við at geva stuðul til brúk av meir olju og koli.

Norski uttanríkismálaráðharrin, Børge Brende, sigur sambært tíðindastovuni NTB, at Noreg kemur at geva 100 milliónir norskar krónur til hetta átakið.

Pengarnir skulu brúkast umvegis Heimsbankan, ið hevur fingið til uppgávu at standa fyri arbeiðnum.

- Í 2013 blivu brúktar meir enn fýra túsund milliard krónur í heiminum til at stuðla meir brúki av fossilum brenni. Í nøkrum menningarlondum er hesin stuðulin heili 20 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni. Hetta merkir at hesin stuðulin tyngir búskapin í hesum londunum,

og hetta eru pengar sum kundu verið brúktir til heilsu, skúlar og onnur átøk til at menna londini, sigur Brende.